## Svendborg vann

Julian Johnsson og liðfelagarnir í Svendborg tóku ímóti eykaliðnum hjá AaB í 2. deild vestur í gjár. Tað eydnaðist heimaliðnum at vinna 1-0. Sigursmálið fall longu aftaná 23 minuttir, og var tað Jesper Rasmussen, sum skjeyt sigursmálið fyri Svendborg. Við sigrinum eru Julian og liðfelagarnir komnir uppá 17 stig fyri 13 dystir, og eru teir nú átta stig omanfyri niðurflytingarstrikuna.



## Silkeborg fekk fult

Føroyski landsliðsspælarin, Christian Lamhauge Holst og liðfelagar hansara í Silkeborg vunnu ein góðan 2-0 sigur á Randers á útivølli í gjár. Christian Lamhauge Holst fekk 71 minuttir á vøllinum, áðrenn hann varð skiftur út við Martin Svenson, og føroyski landsliðsspælarin fekk kortini ikki sjálvur nakað mál hesa ferð. Silkeborg er nummar fimm í SAS-liguni við 24 stigum fyri 14 dystir.

### Fleyr-Mjølnir 2-3 (25-23, 17-25, 18-25, 25-20, 9-15)

# Klassikarin krimaði

Gamli klassikarin millum Fleyr og Mjølnir endaði við einum fimmsettara, har Mjølnir var drúgvari og fekk varðveitt oddasessin

Mynd: Álvur Haraldsen



**Í síni tíð vóru dystirnir millum Havn og Klaksvík teir heilt stóru klassikararnir í føroyskum flogbólti, og í gjár kom so ein ábending um, at tað kunnu teir kanska gerast aftur, tí talan var um drúgvan og skiftandi dyst, tá Fleyr og Mjølnir møttust**




Hilmar Jan Hansen

Enn hevur Fleyr nokk ikki ordiliga fingið tað burturúr, sum liðið hevði ætlað sær í vetur, men tað hevur tó verið nær við tvær ferðir. Í gjár var liðið partur av øðrum fimmsettaranum í vetur, men eins og ímóti SÍ herfyri, endaði Fleyr við at tapa drúgva dystin, so tí lukkaðist heldur ikki hesa ferð at koppa øðrum av fremru liðunum.

Fyrr var tað soleiðis, at dystirnir millum Fleyr og Mjølnir vóru teir stóru klassikararnir í føroyskum flogbólti, men soleiðis hevur ikki ordiliga verið seinnu árini, nú onnur feløg eru komin við millum tey allarfremstu. Og tað er eitt sindur langt síðani, at bæði Fleyr og Mjølnir kappaðust heilt har frammi í senn, men í vetur verður tað kanska øðrvísi.

Í dystinum í gjár fekk Fleyr betru byrjanina, tá tað eydnaðist at vinna fyrsta settið, ið annars var rímiliga javnt. Men so tók Mjølnir yvir og vann greitt tey bæði næstu, áðrenn Fleyr kom fyri seg aftur í fjórða setti. Har var Fleyr fyrst á odda 8-2, men Mjølnir kom aftur og javnaði til 13-13, áðrenn Fleyr aftur fór avstað og kom upp á 20-13, áðrenn Mjølnir enn eina ferð royndi, men ikki fekk fatur í Fleyr aftur.

Nú stóð 2-2 í settum, og alt skuldi avgerast í fimta settinum. Men her vístu menninir í Mjølnir, at teir fegnir vildu verja oddasessin, og teir vórðu í veruleikanum ongantíð ordiliga hóttir. Tá liðini skiftu síðu, var Mjølnir á odda 8-4, og Fleyr fekk ongantíð aftur fatur í klaksvíkingum.

Sum tað gjarna er, tá talan er um ein fimmsettara, var hetta ein undirhaldandi dystur, har Mjølnir til tíðir spældi upp til sítt allarbesta, eins og Fleyr veruliga fekk víst, at liðið er væl á veg fram.

### SÍ-ÍF 3-0 (25-20, 25-17, 25-23)

# Lætt spæl hjá SÍ

**Burtur sæð frá triðja settinum, var mótstøðan frá fuglfirðingum so lítil, at sørvingar kundu vinna ein tryggan sigur, uttan kortini at vera serliga sannførandi**




Hilmar Jan Hansen

Framvegis má helst staðfestast, at tað verður meira enn torført – fyri ikki at siga ógjørligt – hjá fuglfirðingum at endurtaka frálíka ársúrslitið í fjør, tá menninir vunnu bæði landsog steypakappingina og gjørdust steypavinnarar í stórum stíli. Missurin av berandi spælarum sum eitt nú Rúna Weihe og Bartal Eliasen er meinur, og hetta kom eisini til sjóndar í Sørvági leygardagin.

SÍ vann dystin 3-0, og serliga í teimum báðum fyrru settunum høvdu sørvingar lætt spæl. Uttan at vera so øgiliga sannførandi, tí talan var bæði um nógvar feilir og vantandi konsentratión, eydnaðist SÍ at taka tey bæði settini rættiliga einfalt.

ÍF, sum í vetur hevur eina unga og fyri ein part rættiliga óroynda manning, fekk tó mannað seg upp í triðja setti, tá teir fingu bitið meira frá sær, so liðini fylgdust uppeftir allan vegin. Men kortini eydnaðist ikki at gera nakað við SÍ, og fuglfirðingarnir mundu aftaná iðra seg um, at serliga servufeilirnir, ið vóru fleiri í tali í bara hesum eina settinum, kostaðu dýrt.

Avrikið hjá heimaliðnum var verri enn so nøktandi, og tað munnu teir í SÍ vita best sjálvir. Har er nógv at arbeiða við, um liðið veruliga skal bjóða Mjølnir av, men tað kann vera so skjótt, at ein vend kemur í. Hinvegin bendir alsamt meira á, at leikluturin hjá ÍF verður í niðara endanum, og sum er, líkist ÍF einum einsamøllum botnliði í vetur, um ikki liðið fær styrkt sær um manningina ella fingið onkrar av teimum givnu aftur.